

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 09 - 2011

# Føroyingar vitjaðu boripall í Noregi

Tann 30. juni í ár vóru umboð fyri ymsar stovnar og feløg í Føroyum í Sandnes í Noregi, har tey vitjaðu umborð á boripallinum Cosl Pioneer, sum skal seta hol á størstu íløguna nakrantíð í føroyskari søgu komandi vár. Tað var fyristøðufelagið Statoil, sum hevur leigað pallin at bora á landgrunninum komandi ár, ið tó stig til vitjanina. Við í hópinum vóru umboð fyri nógvar føroyskar stovnar, sum hava eitthvørt tilknýti til boringar við Føroyar. Teirra millum Umhvørvisstovan, Landslæknastovnin, Vága Floghavn, løgreglan, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, MRCC, Atlantic Supply Base og umboð fyri Statoil. Seinni í ár ella tíðliga næsta ár fara umboð frá Jarðfeingi út á pallin fyri at taka samanum og vita, um hann lýkur øll krøv frá føroyskari síðu.